## Steypakapping í fimleiki

Komandi sunnudag verður høllin á Kambsdali karmur um fyrru steypakappingina í estetiskum fimleiki. Í tíðindaskriv sigur Fimleikasambandið, at 23 lið hava meldað seg til kappingina, og eru hesi liðini úr Flog, Støkk, Ljósinum og Havnar Fimleikafelag. Ból karnir, sum kappast, eru pinkur, smágentur, gentur, unglingar og kvinnur. Seinna steypakappingin í vár verður í høllini í Runavík, og verður hetta hann 7. og 8. mars.



## City hevur keypt Bellamy

Manchester City hevur enn ikki fingið hendur á Kaka. Men fyri tað heldur nýríka felagið á fram við at styrkja um spælarahópin. Nú er greitt, at Craig Bellamy skal styrkja um álopið hjá Mark Hughes, ið eisini hevur arbeitt saman við Bellamy, tá Hughes vandi walisiska landsliðið. Enskir miðlar skriva, at Manchester City rindar á leið £14 mió fyri spælaran, sum nú fer til Tenerifa, har hópurin er á venjingarlegu. Og sum skilst, er als ikki ósannlíkt, at hollendski Nigel de Jong, sum spælir við týska Hamburger SV, eisini legst afturat hópinum. Hann kostar sambært ensku miðlunum £13 mió.

# Legendan vorðin landsliðsvenjari

**Staffan Olsson er óivað besti svenski hondbóltsspælarin nakrantíð, og eisini ein av Heimsins bestu hondbóltsspælarum gjøgnum tíðinnar. Nú skal hann saman við Ola Lundgren royna at fáa Svøríki fram í fremstu røð aftur**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Svenska hondbóltssambandið hevur eitt brennandi ynski um, at svenska manslandsliðið í hondbólti aftur skal verða millum heimsins bestu. Um aldarskiftið hevði Svøríki vunnið eina røð av EM, HM og OL heiðursmerkjum, men seinastu 6 árini hevur verið reint galið. Og eru endaspæl farin framvið, uttan at Svøríki hevur megnað at spælt seg í hesi EM, HM og OL endaspølini, og tað er nakað, sum eingin dugdi at ímynda sær kundi henda, tá ein var vitni til tey mongu svensku heiðursmerkini.

Tað manglaði bert OL-gullið, so var veitslan fullkomin. Íshokki og fótbóltur hava stóra undirtøku í Svøríki, og krevst tað eisini góð úrslit hjá hondbóltunum fyri at vinna áhugan hjá svenska fólkinum.

Nú er tað nýggja unga hondbóltslandsliðið so komið aftur á ta fyrstu gomlu slóðina, við at hava vunnið sær luttøku í HM-endaspælinum, sum er í Kroatia í hesum døgum.

### Legendan

Og tað er ikki nakar »Harra hvør sum helst«, sum svenska hondbóltslandsliðið hevur sett til at verða landsliðsvenjari saman við Ola Lundgren.

Talan er um ongan minni enn sjálva hársíðu legendina, Staffan Olsson, sum fyllir 45 ár tann 26. mars. Staffan Olsson spælir enn, og hevur hann enn eitt ár eftir av sáttmálanum við norðurtýska liðið, THW Kiel. Staffan Olsson er ein sannur risi. Hann er 199 cm høgur, og vigar hann 99 kg. Hann er lættur at kenna aftur á vøllinum við sínum langa og síða hári. Hann spældi heilar 357 landsdystir fyri Svøríki, og skeyt hann 852 mál í hesum 357 landsdystunum.

Og tað er ikki smávegis av heiðuri sum »Håret« hevur vunnið. Eyðknevnið er sjálvandi upplagt. Hann hevur vunnið 2 HM gull, 4 EM gull, 3 OL silvur, 1 HM silvur og 2 HM bronsur við svenska landsliðnum. Harafturat hevur hann vunnið týsku bundesliguna tvær ferðir. Bundesligan og spanska hondbóltsligan eru heimsins bestu hondbóltsligur í manshondbólti.

### Multitalent

Sum so mong onnur stór ítróttarfólk, so var Staffan eitt multitalent innan ítrótt. Sum smádrongur vandi hann bæði hondbólt, fótbólt, svimjing, frælsar ítróttir og íshokki. Men tá saman um kom, so valdi Staffan Olsson at satsa 100% uppá hondbóltin, og tað er nakað sum øll hondbóltshugað í Svøríki kunnu fegnast um. Staffan fær ræðuliga nógvar spurningar um sítt Samson-kenda hár, men tað tekur hann bara við einum stórum smíli.

- Tá eg var ungur, so var tað rættiliga væl umtókt at hava langt hár. Tá royndi eg at seta hárið upp, og at brúka pannuband, men mær dámdi tað ikki. Men hárið órógvar meg ikki, tað er nú meira áskoðarnir sum ganga høgt uppí hárið hjá mær. Sigur Staffan Olsson.

### Gott yvirblikk

Steffan heldur sjálvur, at størsta styrkin hjá honum er tað stóra yvirblikkið. Sín størsta veikleika metir hann verða, at lagið svingar ov nógv, og tað gongur sjálvandi tíðum út yvir hann sjálvan, og restina av liðnum. Men Staffan heldur sjálvur, at hann er vorðin róligari við árunum. Tað sum Staffan elskar við hondbólti, er at ítróttin hevur alt, sum kann ynska av einum ítrótti: Tað er undirhaldandi, og ógvuliga áskoðaravinarligt við nógvum málum. Ein kann altíð gerast betri í hondbólti. Tað er ikki sum í bovling, at tá ein hevur fingið 10 »strikes« á rað, so hevur ein gjørt sítt. Hondbólturin hevur tað mesta.

### Ikki bara lætt

Men viðhvørt hevur tað verið torført at verða Staffan Olsson. Tá Svøríki var HM-vertur í 1993, bleiv Staffan ofta gjørdur til syndabukk fyri dystirnar, sum vertsliðið tapti. Tá Olympisku Leikirnir vóru í Sidney í 2000 bleiv Staffan skaddur í innleiðandi bólkaspælinum, og mátti hann síggja teir avgerandi dystirnar frá áskoðaraplássunum.

Spælistílurin hjá honum er ógvuliga krevjandi, og tí hendir tað ofta, at Staffan Olsson situr uttanfyri við skaða. Tá HM-endaspælið var í Fraklandi í 2001 gav Staffan avboð til svenska landsliðið, tí hann kendi seg ikki mentalt væl fyri, og hann metti, at kroppurin trongdi til hvílu. Tá var nógv, sum talaði fyri, at Staffan hevði spælt sín seinasta landsdyst fyri Svøríki, eftir 15 ár í gulu og bláu troyggjini.

Men hann var við aftur, tá Svøríki var EM-vertsland í 2002. Størsta ítróttarløtan hjá Staffani, var tá Svøríki vann HM-gull í 1990. Hetta heiðursmerkið, er tað sum Staffan metir hægst av teimum heiðursmerkjunum, hann hevur vunnið við svenska hondbóltslandsliðnum. Heiðursmerki hann er næstmest glaður fyri, er tá tað eydnaðist svensku spælarunum at vinna EM-gull á heimavølli. Hann heldur, at tað var ein ótrúlig kensla at vinna EM-gull á heimavølli, og at hava stuðul frá 14.000 áskoðarum í Globen í Stokkhólmi.

### Nógv ár í Kiel

Staffan spælir við týska liðnum, THW Kiel, sum hevur havt nógvar svenskar spælarar á liðnum gjøgnum árini. M.a. kunnu nevnast Stefan Lövgren, Johan Pettersson og Magnus Wislander. Staffan hevur spælt við Kiel síðani 1996. Áðrenn Staffan kom til Kiel spældi hann við Huttenberg, HK Cliff og Nierwurzbach. Saman við konuni, Marie og báðum børnunum trívist Staffan væl í Týsklandi.

Superveteranurin hevur bara eitt ár eftir av sáttmálanum við Kiel. Hann er ikki vísur í hvat hann fer at gera, tá sáttmálin gongur út: Tað stendur skrivað onkustaðni á himmalhválvinum hvat eg skal gera í framtíðini. Møguliga komi eg at arbeiða hjá einum av sponsorfyritøkunum hjá landsliðnum, sum framleiðir knæverju. So komi eg framvegis at hava samband við hondbóltin. Men hetta er ikki nakað, sum eg eri bangin fyri.

Staffan er tó fullvísur í, at tá hann er givin sum yrkisspælari, so fer hann at búseta seg í Stokkhólmi. Nú hjálpir hann Ola Lundgren við tí nýggja unga svenska landsliðnum. Og tað er ikki at taka seg aftur í, at hesir hava allir verið Staffan Olsson-fjepparar á ungum árum. Um enn tað langa, síða hárið er farið at grána.




*Síða hárið er gránað nakað, men hondbóltsheilin er framvegis intaktur hjá Staffan Olsson, sum telist millum størstu svensku honbdóltsnøvnini yvirhøvur*

*Mynd: Polfoto/AP*